Heja Henke

Norðurlendsku umboðini fingu eina mest sum flúgvandi byrjan, tó at danir hildu seg eiga sigurin uppibornan móti Italia

BÓLKUR C
Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Mánadagurin var so dagurin, tá norðurlendsku grannar okkara úr Danmark og Svøríki skuldu í EM-eldin.

Danir høvdu møtumikla uppgávu, tá teir skuldu takast við Italia, sum av mongum verður mett sum favorittur til sjálvt EM-heitið, men tað skuldi tó vísa seg, at azur-littu menninir so avgjørt vóru til at tosa við.

Um nakað, so vóru tað danir, sum áttu sigurin uppibornan í málleysu uppgerðini. Tað var heilt greitt, at Morten Olsen og hansara menn høvdu gjørt heimarbeiðið til lítar. Fyri tað mesta, so varð imponerandi offensis-ketan hjá Italia hildin í stuttum tjóðuri, og var tað serliga Martin Laursen, sum skaraði framúr í donsku verjuni. Kanska vildi hann eisini prógva, at tað er eitt mistak av Milan, at teir nú hava selt hann til Aston Villa, har David O'Leary hinvegin mundi frøast um, at hann hevur fingið undirskriftina hjá verjuleikarunum upp á pláss undan EM-kappingini.

Og eisini frameftir vøllinum riggaði væl hjá reyða dynamittinum. Serliga bar væl til at spæla italsku verjuna tunna í borðunum, har kviku Rommerdahl og Jørgensen skaptu alskyns trupulleikar, og fleiri ferðir mátti Buffon prógva, at tað ikki er av tilvild, at hann verður mettur sum heimsins besti málverji.

Í hesum fekk hann tó harða kapping frá Thomas Sørensen í danska málinum mánadagin. Sørensen hevði kanska ikki alla verðina at gera, men tvær ferðir vóru tó veruliga boð eftir honum, og báðu ferðina fann málverjin bjargingar í heimsflokki fram.

Og so áttu danir helst at tryggað sær sigurin móti dystarenda, tá Rommerdahl var fyrstu á einum returbólti, men heldur enn at spæla púra blanka Perez, valdi hann at skjóta, og so fekk italskur verjuleikari ruddað burtur.

Henrik Larsson og hinar svensku stjørnurnar vóru flúgvandi, tá Bulgaria varð spælt niður og norð

Stjørnurnar skoraðu

Í Svøríki var stóra søgan undan EM sjálvandi, at Henrik Larsson nú aftur var tøkur hjá landsliðnum. Sjálvt forsetisráðharrin og UEFA-forsetin vóru millum teirra, sum heittu á álopsessið at koma aftur á landsliðið, so tað er einki at siga til, at fagnaðurin var stórur, tá hetta gjørdist veruleiki.

Tað vóru tó eisini tey, sum ikki vóru so fegin um hetta. Serliga stúrdu tey fyri, um Henke kundi finna seg til rættis millum hinar stóru stjørnurnar á svenska liðnum, men mánadagurin vísti so, at hetta ikki tykist gerast nakar trupulleiki.

Tá sagt verður »hinar stjørnurnar«, so verður fyrst og fremst hugsað um Ljungberg og Ibrahimovic, og saman við Larsson sýndu teir stórspæl í dystinum móti Bulgaria.

Fyrstu løtuna var Bulgaria annars væl við, men sum dysturin leið, so gjørdist talan um veruligan klassamun.

Serliga var tað Ljungberg, sum við síni arbeiðsøði og kvikleika skapti rumbul í bulgarsku verjuna, og hóskandi var tað eisini hann, sum á hálva tímanum kundi leggja sviar á odda, tá Ibrahimovic sýndi óvanligt medvit fyri viðleikara, og spældi Ljungberg heldur enn at skjóta sjálvur.

Og eitt korter inn í seinna hálvleik punkteraði Henke so av álvara Bulgaria. Fryst drønstútaði hann eitt innlegg frá Edman í kassan, og bara 30 sekund seinni var hann aftur á rætta staðnum, tá Svensson sendi innfyri.

Talan kundi enntá verið um Henke-Hattrick, men tá Ljungberg vann brotsspark, varð Ibrahimovic settur at skjóta, og so kundi eisini hann taka lut í málvetsluni.

Seinasti limurin í svenska álopstríbólkinum var Marcus Allbäck, sum kom á vøllin í 82. minutti, og í yvirtíðini kundi hann staðfesta rimmarsigurin, tá Henrik Larsson leikti hann púra blankan.

Størsti sigurin higartil í EM var veruleiki, og so tykist spurningurin bara vera, hvørt tað skal eydnast báðum norðurlendsku umboðunum at koma víðari úr bólkaspælinum. Her kemur nógv at snúgva seg um, hvussu leikur fer millum Svøríki og Italia í næsta dystinum, og so kann tað væl vera, at tað verður ein fyrimunur, at tær báðar grannatjóðirnar skulu spæla sínamillum í seinasta dystinum í bólkaspælinum.

EM-endaspælið í fótbólti

Bólkur A

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Grikkaland	1	1	0	0	2	1	1	3
2 Spania	1	1	0	0	1	0	1	3
3 Portugal	1	0	0	1	1	2	-1	0
4 Russland	1	0	0	1	0	1	-1	0

Bólkur B

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Frakland	1	1	0	0	2	1	1	3
2 Sveis	1	0	1	0	0	0	0	1
3 Kroatia	1	0	1	0	0	0	0	1
4 Ongland	1	0	0	1	1	2	-1	0

Bólkur C

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Svøríki	1	1	0	0	5	0	5	3
2 Danmark	1	0	1	0	0	0	0	1
3 Italia	1	0	1	0	0	0	0	1
4 Bulgaria	1	0	0	1	0	5	-5	0

Bólkur D

	d	v	j	t	v mál	t mál	+/-	stig
1 Týskland	0	0	0	0	0	0	0	0
2 Holland	0	0	0	0	0	0	0	0
3 Kekkia	0	0	0	0	0	0	0	0
4 Letland	0	0	0	0	0	0	0	0

EM-KAPPINGIN

2. UMFAR			1	X	2
Bulgaria-Danmark	Bólkur C:	18. juni kl. 17.00			
Italia-Svøríki	Bólkur C:	18. juni kl. 19.45			
Letland-Týskland	Bólkur D:	19. juni kl. 17.00			
Holland-Kekkia	Bólkur D:	19. juni kl. 19.45			
Russland-Grikkaland	Bólkur A:	20. juni kl. 19.45			
Spania-Portugal	Bólkur A:	20. juni kl. 19.45			
Sveis-Frakland	Bólkur B:	21. juni kl. 19.45			
Kroatia-Ongland	Bólkur B:	21. juni kl. 19.45			
Italia-Bulgaria	Bólkur C:	22. juni kl. 19.45			
Danmark-Svøríki	Bólkur C:	22. juni kl. 19.45			
Týskland-Kekkia	Bólkur D:	23. juni kl. 19.45			
Holland-Letland	Bólkur D:	23. juni kl. 19.45			

At senda til: EM-spælið, postsmoga 3341, FO-110 Tórshavn
Seðilin kann eisini latast inn hjá Kiosk Steinatún í Havn.
Seðilin skal vera okkum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin, 18. juni kl. 15.00

Fornavn _____
Eftirnavn _____
Føðingardagur _____
Lið nr: _____
Bústaður _____
Postnr. og staður _____

Sosialurin KIOSK Steinatún

Panucci var nøgdur við stigið

Danmark og Svøríki stóðu seg væl í sínum fyrstu dystum í EM-kappingini í Portugal. Danmark spældi væl og fekk javnleik ímóti favorittunum úr Italia, og Svøríki vant burturúr Bulgaria og vann 5-0.

Italski landsliðsspælarin Christian Panucci fjaldi eftir dystin ímóti Danmark ikki út yvir, hvør hann helt hevði staðið seg best í dystinum.

– Vit mugu siga, at tað var í lagi við einum stigi. Danir vóru betri enn vit, og teir vístu, at teir hava eitt gott lið. Vit vóru als ikki við í fyrra hálvleiki, men vit høvdu tveir góðar kjansir í seinna hálvleiki, segði Panucci, sum væntaði, at italska liðið fór at spæla munandi betri í næsta dystinum, sum verður í móti Svøríki.

-ek

Thomasson var errin

Jon Dahl Thomasson, sum var ein av teimum bestu á danska liðnum, var væl nøgdur við dystin ímóti Italia.

– Vit høvdu teir størru møguleikarnar, og skuldi nakar vunnið dystin, so skuldi tað púra vist verið vit. Men vit kundu eisini havt tapt dystin, men samanlagt skulu vit verða nøgdir við ein góðan innsats, segði Jon Dahl Thomasson.

Hann helt, at dysturin vísti, at italiumenn hava trupulleikar við liðum, sum spæla breitt álopsspæl.

– Vit runnu kanska eitt sindur meira enn teir italsku spælararnir, men tað er flott, at vit kunnu stýra einum dysti ímóti einum landi sum Italia, helt Jon Dahl Thomasson.

-ek

Norðmenn hugtiknir av dønum

Norski landsliðsvenjarin, Åge Hareide, var hugtikin av danska spælinum mánadagin.

– Eg verði glaður, tá ið eitt norðurlendsk lið klárar seg so væl ímóti Italia og vísir, at vit kunnu taka stig frá teimum, segði Hareide við blaðið VG.

– Danir spældu skilagott, og teir gjørdu italiumenn vánaligar. Totti, Del Piero og Vieri blivu púra burtur í dystinum, helt Åge Hareide, sum verður noyddur at fylgja EM-kappingini sum áskoðari, tí Noreg kom ikki við til endaspælið.

-ek

Henke ávaraði

Sviar vóru ovurfegnir eftir 5-0 sigurin á Bulgaria í gjárkvøldið, men stóra stjørnan á liðnum, Henke Larsson, bæði sviar sláa kalt vatn í blóðið.

– Hetta var eitt sera gott úrslit, men hetta er bara fyrsti dysturin, og vit mugu ikki verða tiknir á fótum. Tað er langur vegur eftir enn. Í kvøld kunnu vit njóta sigurin, men í morgin mugu vit hugsa um næsta dystin, segði Henke Larsson eftir dystin, har hann gekk undan við tveimum málum innan fyri tveir minuttir.

– Alt liðið spældi sera væl, og eg kann ikki minnast, at eg havi spælt við í einum so undirhaldandi dysti hjá Svøríki, segði Henke Larsson.

-ek

Góðska á hægsta støði, hevur eitt navn!
Spyr sjálvandi eftir
ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR ECHOSTAR

Gerið kvettið:
1 Echostar boks og 1 skermur

Við í prísinum eru:
- 10 rásir frá BBC
- 4 andaligar rásir
- 1 barnarás
- 2 filmrásir
- 3 tíðindarásir
- og fleiri aðrar

Fyri einans **2.995,-**

Allar eru gjaldsfríar rásir

Dragon modulir, ið kenna næstan alt, eru nú aftur at fáa fyri kr. 1.500,-

Alt til parabol og sjónvarp nú á goymslu, so sum motorar modulir og mangt annað

Hevur hetta tín áhuga, eru vit at hitta á tel 42 14 11 ella 21 53 28

Nógv onnur góð tilboð á www.bio.fo/skyinterline

CAMPINGVOGNUR TIL SØLU

Ein sera vælhildin LMC luksus 580 Campingvognur til sølu
- Skrásettur 4/2001
- Stórt Isabella fortelt
- 5/6 sovipláss (2 koyggjur)
- WC, hitaovn við luftskifti, 12v-220v, heitt-kaltvatn, køliskáp

Telefon 31 19 60 ella 26 11 24

Mentamálaráðið
Fólkaskúladeildin

Endurlýsing Lærugreinaráðgevi

Starvið
Í Landsmiðstøðini eru nakrir ráðgevatímar leysir at søkja til setanar frá 1. august 2004.

Ráðgevingin fevnir í fyrsta lagi um **støddfrøði, alis- og evnafrøði og náttúra/tøkni.**

Samanlagt eru 8 lønartímar um vikuna at søkja. Umroknað er hetta 533 fyrisitingartímar fyri árið.

Førleikakrøv
Umsøkjarar eiga at hava hollan ástøðiligan kunnleika og starvsligar royndir í viðkomandi lærugrein og starvsøki, starvið fatar um. Væntað verður, at lærugreinaráðgevin hevur førleika í og er hugaður at nýta kt í ráðgevastarvinum.

Setanar- og lønartreytir
Lærugreinaráðgevar verða settir eftir avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og løntir í lønarflokki 30.3. Tann, ið settur verður, skal undirvísa írestandi tímarnar í skúlanum, har viðkomandi starvast dagliga.

Starvslýsing
Ein starvslýsing er galdandi fyri ráðgevastarvið. Eitt nú verður sagt:
- Ráðgevin skal í øllum lutum virka fyri einari námsligari menning í skúlanum
- Ráðgevin skal støðugt halda seg kunnugan við ta menning, sum er á námsliga, fakliga og tøkniliga økinum
- Ráðgeva viðvíkjandi undirvísingarmiðlum og arbeiðshættum í einstøku lærugreinunum.

Lagt verður upp til eitt skipað samstarv millum ráðgevarnar, møguliga í tvørgreinaligum bólkum og í toymum.

Umsókn
Umsóknir við prógvum o.ø. skulu vera Landsmiðstøðini, Hoyvíksvegi 72, Postrúm 3084, 110 Tórshavn í hendi í seinasta lagi mikudagin 30. juni 2004.

Gjøllari upplýsingar fáast frá Petur Simonsen, stjóra á Landsmiðstøðini, tlf. 318825.

Mentamálaráðið og Landsmiðstøðin

Mentamálaráðið *hevur sum høvuðsuppgávu at fyrisita undirvísingarmál, mentamál og gransking. Harafturat eru uppgávur viðvíkjandi kirkju, loftmiðlum, ítrótti og øðrum frítíðarvirksemi.*
Landsmiðstøðin *er tænastustovnur í undirvísingarverkinum. Landsmiðstøðin sýnir fram og lænir út undirvísingarmiðlar, hevur verkstaðarmøguleikar, hevur saman við Mentamálaráðnum eina lærugreinaráðgevaskipan og skipar fyri skeiðum við fakligum og námsligum innihaldi.*

Bróðurringurin á Havinum

Ársfundirnir 2004 verða í ár hetta vikuskifti í Leguhúsinumí Nesvík.

Fríggjadagin 18. juni kl. 20.00
Møti v/ Sylverius Jacobsen, Skála og Gulak Hansen, Tjørnuvík, Jónhilda og Gulak Hansen syngja.

Leygardagin 19. juni kl. 20.00
Møti v/ Ole Nielsen, Danmark og Símin Joensen, Saltangará, Streingjakórið á Glyvrum syngur.

Sunnudagin 20. juni kl. 11.00
Gudstænasta og altargongd í Haldórsvíkar kirkju v/ Sverra Steinhólm, presti.

kl. 18.00
Møti v/ Niels Jacob Nielsen, trúboðara, Strendur og Regin Olsen, Tórshavn, sangbólkurin Gittit syngur.

Møtini eru almenn.

Limafundurin verður leygardagin 19. juni 2004 kl. 15.00 v/ Regin Olsen, Tórshavn.

Stýrið fyri Bróðurringin á Havinum

Fuglafjarðar skúli

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2004/05.

- **4 lærarastørv** fyrilærarar í farloyvi
- **1 lærarastarv** 19 t/v fyri lærarar við niðursettum tímatali
- **1 starv** sum sergreinalærari 6 t/v at undirvísa í motorlæru

Størvini, ið eru tíðaravmarkað skúlaárið 2004/05, verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið.

- **1 starv** sum stuðul 19 t/v.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 444087 ella 214087.

Umsóknir skulu verða skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi **mánadagin 21. juni kl. 10.00.**

Leggið við ljósrit av prógvi og møguligum viðmælum!

Fuglafjarðar skúlastýri
v/ Una Næs
FO-530 Fuglafjørður